**Tveir einglar.**

Tilfar og amboð: Pappír, saks, blýant, lím, tekniblýantar, band/tráð og nál.

1. Prentað arkið út.
2. Límað arkið á eitt tjúkt pappír og klipp alt út.
   Nú hava tit skapini til eingilin.
3. Tekna skapini av, á tað pappírið tit vilja brúka.
4. Klipp tann eina rundingin í helvt til veingir.
5. Bukkað tveir av rundingunum saman til kroppar, og líma teir saman. Brúka strikurnar sum leiðbeining.
6. Teknað eygu, nøs, munn og hár á høvdini, og líma tey á hvør sín kropp.
7. Límað veingir á bakið.

At enda:Tráðað eina nál og seymað eitt hol í, ovast á einglinum. Drag tráðin ígjøgnum, bint knút á og so er bara eftir, at heingja eingilin upp.

